## DAGSINS MEINING

# Samvinna við Skotland og oyggjarnar

Í næstum verður skotsk vika í Havn. Hetta er partur av tí vinarbýarsamstarvi, sum er millum Tórshavn og Aberdeen. Vinnulívsfólk, handilsfólk og listafólk av ymsum slag koma henda vegin at sýna og vísa seg fram. Tað var á oljumessuni í Aberdeen herfyri, at seinasta hond varð løgd á fyrireikingarnar til skotsku dagarnar, sum verða ymsa staðni í høvuðsstaðnum.

Skotar skulu vera so hjartaliga vælkomnir til Føroya. Hóast vit eru næstu grannar, so kenst tað líkasum at vit hava verið so fjar hvør frá øðrum gjøgnum øldir. Alt ov fjar. Tí hvat skuldi verið meira náttúrligt enn eitt tætt samstarv á øllum hugsandi økjum. Væl eru vit í ríkisfelagsskapi við Danmark, men harfyri eiga vit ikki bara at stara okkum blind tann vegin. Heimurin er stórur og stendur víðopin fyri okkum øllum. Tað ræður bara um at síggja møguleikarnar og so fara undir uppgávurnar. Og hesar uppgávur kunnu vera so nógv.

Ein teirra er at samskifta og samvinna innan ídnað og handil. Eitt annað øki er mentanin. Og uppaftur eitt øki, sum kanska er tað mest týðandi og grundarlagið undir einum veruligum samstarvi og sínamillum virðing og forstáilsi er útbúgvingin av okkara unga fólki. Vit hava seinastu árini sæð, at fleiri og fleiri føroyingar fara til Aberdeen og onnur støð í Bretlandi at útbúgva seg. Hetta er kærkomið. Tí okkara ungu skulu hava fleiri møguleikar at velja sær útbúgvarstað enn bara Danmark. Harfyri er ikki sagt, at tey skulu gevast at fara til danskar útbúgvingarstovnar. Spurningurin er meira um bæði og.

Sum lítið og fjarskotið samfelag hava vit brúk fyri, at okkara unga fólk nemur sær kunnleika og vitan í nógvum londum. Tá tey koma heimaftur hava tey við sær íblástur og vitan av ymiskum slag og frá ymsum tjóðum og nationalitetum. Tað er sunt fyri okkara samfelag. Tað er við til at fjøltátta heldur enn at einsrætta. Vit skulu hyggja í allar ættir og læra av øllum. Taka tað besta til okkum.

At vit so eisini royna at fáa tættari samband við oyggjarnar norðan fyri Skotland, eitt nú Hetland og Orknoyggjar er at fegnast um. Í næstum verður stór ráðstevna í Hetlandi, har eisini vit føroyingar eru við. Frá føroyskari síðu hevur ikki minst varaløgmaður og ráðharrin í Norðurlandamálum, Høgni Hoydal lagt stóran dent á nettupp umrødda samstarv við grannarnar fyri sunnan. Tað er skilagóður og frameftirhyggjandi politikkur, sum vit øll eiga at taka fult undir við. Eitt nú ein komandi oljuvinna á Atlantsmótinum krevur tað av okkum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Svar til Pól og Lassa

**Sjúrður Skaale**



Eftir at eg vísti á, at Lasse Klein í farnu viku undir egnum navni prentaði eina grein, hvørs tekst hann hevði umsett úr Weekendavísini, havi eg fingið trý svar. Ikki færri enn tvey frá Lassa sjálvum, og eitt frá Pól á Kletti, sum tekur sær av Skáanum í Dimmalætting.

Pól á Kletti hevur heft seg við hetta brotið úr míni grein: "Tann, sum lesur donsk bløð, leggur til merkis, at fólk, sum skriva Skáan í Dimmalætting leygardagar, viðhvørt stjala sínar greinar. Tey umseta okkurt úr Politiken ella Berlingske, og selja tað síðani til Dimmu sum um tey hava skrivað tað sjálv."

Hesum trýr Pól á Kletti ikki, og vísir á, at talan er um fólk, sum bæði eru gløgg og væl lærd — serfrøðingar á hvør sínum øki. Og at hesi fólk "styðja seg til skriftligar keldur", heldur hann vera, sum tað skal.

Tað er tað eisini. Vit styðja okkum øll til skrivligar keldur alla tíðina. Men Póli kunnugt eru í Skáanum eisini fólk, sum skriva um snøgt sagt øll heimsins viðurskifti, uttan nakrantíð at vísa til nakra keldu. Og hvussu væl lærdur og klókur tú so ert, so kanst tú ikki vita alt um bæði flogferðslu og krabbamein og súkkling og terroristafelagsskapir og fólkatónleik og cyberspace og filmssøgu — umframt alt hitt. Eingin kann vera serfrøðingur í øllum. Hugsar Pól seg um man hann duga at síggja, at her er ikki altíð talan um at "styðja seg til keldur". Viðhvørt er talan um umseting.

Ikki tí — tað er óføra gott at Skái skrivar um alt hetta ymiska. Men tað er skeivt at høvundarnir ikki upplýsa, hvaðani teir taka tilfarið.

Pól biðjur eisini um dømi. Eftir at hava zappað eina løtu á internetinum kom eg fram á hetta: Greinin "Lennon-McCartney", sum stóð í Skáanum 10. juni í ár, hevði, burtursæð frá innganginum, staðið í Politiken 2. mai í ár. Orð fyri orð.

**Lasse**

Lasse Klein vil í sínari viðmerking ikki rættiliga vera við, at hann hevur stolið nakað. Tað, at hann hevur umsett orðini hjá einum øðrum manni og síðani prentað tey undir egnum navni, kallar hann ikki fyri stuldur, men lætt og elegant fyri "íblástur".

Gott, at týðarar ikki hava somu fatan. Høvdu teir tað, hevði Heðin Brú t.d. í síni tíð kunnað givið út Karamasov Brøðurnar undir egnum navni. Hevði onkur spurt kundi hann bara svarað, at Dostojevski hevði givið honum íblástur til skaldsøguna...

# Vegurin Skálabotnur - Strendur

**Tummas Eli H. Joensen**

Nú verður fíggjarlógin smíða fyri komandi ár, av okkara kosnu monnum.

Vit her á vestara armi á Skála — fjørðinum, eru sera spent eftir at frætta tey tíðindi, at nú eru so og so nógvar milliónir settar av til okkara veg. Kanska okkara kosnu menn hava sæð tann trupulleika, sum vit hava av hesum strekkið og vilja teir tí nú, sjálvandi, soleiðis sum teir lovaðu til seinasta val, at her skal gerast liðugt ongantíð ov skjótt. Helst skal tað verða liðugt áðrenn tað er byrjað søgdu summir!

Her er nakað av vegi gjørt, treyðugt so og eg fari nokk ikki nógv skeivur, um eg haldi, at teir allir taka sær æruna av hesum.

Vit her á vestara armi, eru veljarar, sum hava tryggja fleiri av teimum sum sita á tingi fyri Eysturoynna tingsessin við okkara stemmum og tí vildi tað ikki verið ov nógv kravt av hesum monnum, at teir vístu á sína ónøgd alment í bløðunum og har ein kann gera seg galdandi fyri hesari søk.

Ein er tó sum hevur skriva um hettar í síðstuni og tað er Torbjørn Jacobsen.

Eg vóni ikki, at TJ skrivar um hetta sum eitt spæl fyri gallaríðinum, tí TJ hevur góðan møguleikan til at gera sína ávirkan galdandi. TJ er 17 maður í samgonguni og vanligt er at siga, at ein í tílíkari støðu kann gera seg galdandi. TJ veit eisini sum vit onnur, at sagt varð tá ið Skálafjarðar siglingin varð niðurløgd, at hesir pengarnir skuldu brúkast til vegin. Vegurin er ein íløga og ikki sum siglingin, ein rakstur sum skal gjaldast á hvørjum árið.

Eg kann endurgeva eitt av argumentunum ið var brúkt av samgonguni fyri nettupp at niðurleggja siglingina og brúka peningin til annað endamál

"*Bjarni Djurholm metir ikki at núverandi sigling er ein varandi loysn, og tí er tað spill at brúka 6 mio kr. uppá eina rutu ið ikki kann rekast á ein tíðarhóskandi máta. Ístaðin ætlar hann at flyta tær 6 milliónirnar, ið rutan kostar, frá rakstri til íløgu, og í staðin brúka peningin til at betra um vegin millum Skála og Strendur* ." Hetta sigur ikki so lítið!

Tá tað nú er samgongan sum situr við tí longra stránum, má eisini heitast á hinar samgonguflokkarnar sum lovaðu so nógv og tí vunnu valið, um at gera seg galdandi!

Hvar er til dømis.

Sjálvstýrisflokkurin? Kári er væl eisini greiður yvir, at hann kann roknast sum 17 maðurin.

Miðflokkurin? Hann hugsar helst ikki um okkum meira, síðan hann bert hevur tingmannin í Suðurstreymi.

Fólkaflokkurin? Teir hava okkum kanska í tonkunum? Tó havi vit einki sæð til tað.

Nú skulu hesi valevnir ikki føla seg so ógvuliga illa, tí ein og hvør veit, at er valið ímillum ein veg í bygdini hjá tingmanninum og okkara veg, eru vit ikki so góðtrúgvin at halda, at okkara vegur verður tikin fram um tann lokala bygdavegin!

Gott hevði tí verið, um hesi valevnini greiddi okkum frá um teir ætlað at gera nakað við hetta ella ikki, soleiðis, at vit ikki kenna okkum heilt gloymd og bara fáa gylt lyftir tá val er í hondum.

Eitt vita vit øll, at í 2006 tá val verður aftur, verður helst enn einaferð kappbjóða um hendan veg.

Tá tinglimirnir ikki gera so nógv við hetta mál, skal mín áheitan eisini verða á Vinnumálaráðið um, at hóast tað, at tómligt er í kassanum, gloym ikki hendan veg, tí hann er alneyðugur fyri menningina og trygdina á hesum økinum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Trý mentafólk heiðrað



*Alexandur Kristiansen, Marianne Clausen og Vilhelm Magnussen fingu M.A. Jacobsen virðislønirnar fyri 2003.*

*Myndir: Jens K. Vang*

**Vilhelm Magnusssen fekk virðisløn fyri mentanarligt avrik, Alexandur fyri barnabókmentir og Marianne Clausen fyri yrkisbókmentir, tá M.A. Jacobsens virðislønir hjá Tórshavnar býráð vórðu handaðar í Sjónleikarhúsinum mikukvøldið**

VIRÐISLØNIR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tríggjar virðislønir vóru í ár lætnar á føðingardegi M.A. Jacobsens, tann 17. september.

Vilhelm Magnussen, Marianne Clausen og Alexandur Kristiansen vóru øll heiðrað fyri at hava lagt afturat tí føroyska mentanarskattinum og fyri hava ríkað land og fólk.

### Kingo-verjin

Síðstu árini hevur M.A. Jacobsen virðislønin verið víðkað við einari virðisløn til fólk, ið hava útint okkurt serligt mentanarliga fyri føroyingar. Í ár fall heiðurin á Vilhelm Magnussen, sum hevur stríðst fyri at varðveita kingoløgini.

Dómsnevndin sigur, at »Vilhelm Magnussen hevur við lítillætni og trúskapi móti andaliga sálmasangi forfedra sína givið okkum kunnleika til inniligu gudsdýrkan føroyingsins í forum«.

Sagt verður, at við kingoløgunum, sum hann hevur varðveitt úr heimbygdini Tjørnuvík, »verða vit hevjað upp úr tí dagliga til ein felagsskap við tað guddómliga, ið bar føroyingin í takklæti til Skaparans fyri fong og gjøgnum vandar á sjógvi og landi«.

### Kvæða-kempan

Tað var eisini ein verji av gomlum løgum, sum fekk M.A Jacobsen virðislønina fyri yrkisbókmentir. Marianne Clausen fekk virðislønina fyri hennara arbeiði at skriva nótar til føroysk kvæðaløg eftir ljóðupptøkum frá heilari øld í bókini »Føroya kvæði VIII – Løgini«.

Hvørt lag er uppteknað í einum fjølbroyttum úrvali av staðbundnum og tíðarbundnum frábrigdum, umboðandi 331 skiparar og ótaldar dansarar. Við bókini eru okkara verðsligi tónlistaarvur varðveittur. Løgini eru skipað eftir bygdum, og skráir gera, at lætt er at leita í bókini, sum eisini hevur grein eftir Marionnu um kvæðaløgini.

Dómsnevndin sigur, at bókin er eitt megnararbeiði, sum »kann fáa stóran týdning, bæði við at nøra um kunnleikan til fleiri kvæðaløg og frábrigdi enn tey, sum kend eru manna millum, og fyri gransking av løgunum.«

### Barnayrkjarin

Triðju virðislønina í ár fekk Alexandur Kristiansen, sum í nógv ár hevur yrkt til børn.

»Í stívliga trý áratíggju hevur hesin virkni og eldhugaði høvundi hugtikið føroysk børn við sínum skaldskapi, sum brosar av kæti, álvara og hugflogi.

Við yrkingum sínum fær Alexandur Kristiansen bæði børn, ung og vaksin at smílast, flenna, hugsa og undrast,« sigur Dómsnevndin millum annað í sínari grundgeving.



